**Tíðargreinin: eitt íkast til føroyska orðaskiftið**
Sosialurin hevur tíðargrein í blaðnum týsdag og hósdag
Hevur tú hug at gera títt íkast til føroyska kjakið í 2009?
Send eina grein til post@sosialurin.fo
Kravið er, at greinin er á leið 6000 tekn og skrivað í essay stíli

# Heimsumfatandi netverkið av føroyingum



TÍÐARGREININ
*Rúnar Reistrup*
*London*

**Um 20 ár býr størsti parturin av teimum væl útbúnu føroyingunum uttanlands. Skulu Føroyar í framtíðini gera sær vónir um at vera annað og meira enn eitt feriuparadís fyri hendan globaliseraða bólk av landsmonnum okkara, so mugu broytingar gerast soleiðis at føroyingar í útlegd gerast minni avskornir frá Føroyum. Hetta krevur dirvi at hugsa um Føroyar sum annað og meira enn eitt landafrøðiliga avmarkið øki, og eitt alneyðugt stig á leiðini er at geva føroyingum uttanlands valrætt í Føroyum.**

Okkurt er í umbúna millum føroyingar, ið komandi 20 árini fer at broyta føroyska búsetingarmynstrið grundleggjandi.

Her snýr tað seg ikki um fólkabýtið millum bygd og bý, ella millum útijaðara og høvuðsstað, men um býtið millum føroyingar, ið liva innan fyri føroyska landamarkið og føroyingar, sum liva uttan fyri hetta mark. Nógv fleiri føroyingar, serliga teir væl útbúnu og tey við aðrari servitan av fakligum ella kreativum slag, fara í framtíðini at brúka ein nógv størri part av sínum lívi uttanfyri heimlandið enn higartil.

Hetta hevur størri avbjóðingar við sær fyri føroyska samfelagið enn tey flestu geva sær far um. Tí um vit í framtíðini ikki skulu missa nøkur av okkara bestu fólkum, so er neyðugt at Føroyar tekur ítøkilig stig til at víðka seg sum land fyri eisini at umfata teir føroyingar, sum búleikast uttanfyri landið í longri og styttri tíðarskeið.

## Mentunarligt og intellektuelt innavl

Verður hetta ikki gjørt, er vandi fyri, at Føroyar verða merktar av mentunarligum og intellektuellum innavli í einum annars globaliseraðum heimi - og við hesum verður frástøðan millum føroyingar í Føroyum og føroyingar í útlegd so stór, at annars sterka bandið til heimlandið fer at slitna, og væl útbúnir og framfýsnir føroyingar uttanlands ongantíð flyta heimaftur.

> *Túnatosið, sleygið og alt hitt, sum heldur mentunarliga sambandið í einum lítlum samfelagi sum Føroyum við líka, er vorðið globaliserað, og helst er innihaldið á Facebook onga aðrastaðni so gerandissligt sum millum føroyingar tvørturum allan heim.*

Um Føroyar hinvegin duga at lofta møguleikanum og knýta føroyingar í útlegd og teirra vitan afturat sær, kunnu hesir gerast ein sannur fongur fyri einar globaliseraðar Føroyar, hóast teir ikki búgva í landinum. Í besta føri kunnu Føroyar fara at strekka seg langt útum sjálvan oyggjaflokkin í norðuratlantshavi og gerast eitt heimsumfatandi netverk av føroyingum, har útbúnir føroyingar við altjóða servitan og royndum, staddir uttanfyri landið, gerast ein mentunarligur og politskur partur av Føroyum og luttaka í føroyska samfelagnum á jøvnum føti við føroyingar búsitandi í Føroyum.

## Fráflytingin er byrjað

Sambært hagtølunum fyri flytingina til og úr Føroyum hesi seinastu seks árini, eru fleiri fólk flutt úr Føroyum enn til Føroya øll árini uttan í 2008. Í miðal hava Føroyar mist fleiri enn 100 fólk um árið síðan 2004. Hetta er enntá hent hóast føroyski arbeiðsmarknaðurin var glóðheitur í sama tíðarskeiði, og dyrgt varð dúgliga eftir útbúnum og hálvútbúnum fólki uttanlands.

Tølini benda á eina gongd, sum júst er byrjað, men sum gerst alt meira týðulig – føroyingar, ið flyta uttanlands í útbúgvingar- og arbeiðsørindum, koma ikki longur heimaftur líka skjótt og í sama mun sum fyrr. Okkurt er broytt í hesum tíðarskeiði, sum hevur fingið føroyingar at støðast betur uttanlands og minkað um tørvin at flyta heim aftur.

## Tann globaliseraði føroyingurin

Ein stórur partur av frágreiðingini um, hví føroyingar støðast betur uttanlands, liggur í menningini og útbreiðsluni av internetinum og teimum rembingum, sum tað hevur havt við sær. Hetta hevur sum kunnugt fingið heitið globalisering ella altjóðagerð.

Fyri føroyingar hevði internetið við sær, at knappliga bar til at fylgja við í tí, sum bleiv sagt og skrivað í føroyskum fjølmiðlurm og síggja Dag & Viku heima í stovuni, uttan mun til um stovan var í Signabø ella Singapore. Og við videosamrøðum um internetið gjørdist tað møguligt at síggja ommuna í Fuglafirði minst einaferð um vikuna, uttan mun til um tú búi í Havn ella Hanstholm.

Tá annarhvør føroyingur knappliga var umboðaður á Facebook, gjørdist fjarstøðan millum føroyingar í Føroyum og føroyingar uttanlands í einum taki so stutt, at nú visti tú hvør bakaði bollar í Leirvík, hóast tú vart staddur í London. Túnatosið, sleygið og alt hitt, sum heldur mentunarliga sambandið í einum lítlum samfelagi sum Føroyum við líka, er vorðið globaliserað, og helst er innihaldið á Facebook onga aðrastaðni so gerandissligt sum millum føroyingar tvørturum allan heim.

Vinar- og familjubondini tvørtur um hav eru soleiðis tættari nú enn nakrantíð, og við hesari heimsins gongd er eitt nýtt slag av føroyingi blivið alsamt vanligari: Tann globaliseraði føroyingurin, sum hóast hann kennir eitt sterkt og fullkomið mentunarligt tilknýti til Føroyar, ikki ætlar sær "heim" aftur í bræði og ivast í, um hann nakrantíð kemur aftur til Føroya. Ikki tí at hann ikki hevur hug og tørv á at vera partur av Føroyum, men tí at hesin tørvur verður so at siga uppfyltur, uttan at hann nýtist at búgva og arbeiða her.

## Rótfestir í sama bøkki

Globaliseraði føroyingurin er ikki minni føroyingur fyri tað um hann býr uttanlands í 10 ella 20 ár. Føroyingar eru nevniliga eitt fólkaslag, sum er sjáldsama væl rótfest í sama bøkki. Hetta fæst sjón fyri søgn í kanningunum, sum eru gjørdar av føroyingum uttanlands av ávíkavist Norðuratlantsbólkinum og Uttanríkisráðnum. Sambært hesum kanningum eru tað teir fægstu føroyingarnir uttanlands, sum hava mist tilknýtið til heimlandið, og føroyingar uttanlands halda saman sum fáir. Dømini eru soleiðis nógv um, hvussu føroyingar uttanlands hava hjálpt øðrum føroyingum í størv hjá útlendskum fyritøkum - ella hjálpt føroyskum fyritøkum inn á útlendskar marknaðir.

Hetta er livandi prógv um, at tað "heimsumfatandi netverkið av føroyingum" longu er til. Og um vit brúka hetta rætt og





Tíðargreinin